

*Hans Pauli Strøm er í hørðum andróðri í løtuni*

# Hans Pauli umhugsar støðuna

**Tað verður ikki fyrr enn eftir fund við flokkin og formannin, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, tekur støðu til, hvat hann fer at gera**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hann hevur fyrr ikki verið til at vika, men um vikuskiftið segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, við Kringvarpið, at hann umhugsar støðu sína eftir at landsstýrismannanevndin hevur avgjørt, at hann hevur brotið stýrisskipanarlógina við ovurnýtslu seinastu árini.

Jóannes Eidesgaard segði við sjónvarpið fríggjadagin, at hvørki hann ella flokkurin fóru at taka nakra støðu fyrr enn málið er viðgjørt, og tann fundurin er settur at verða í kvøld.

Andstøðuflokkarnir krevja, at Hans Pauli Strøm leggur frá sær, meðan Fólkaflokkurin ikki metir hetta sum eitt samgongumál.

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hevur ikki enn tikið støðu til málið, men roknast kann við, at ein avgerð fellir, so ella so, eftir fundin í Javnaðarflokkinum í kvøld. Verður eingin avgerð tikin í kvøld, verður tað upp til løgmann at gera av, hvør lagnan hjá Hans Paula Strøm verður.

# Leiðreglur fyri lýsingar

**Brúkaraumboðið fer at kunngerða fyrstu leiðreglur og vegleiðingar á Tele økinum í Føroyum til frama fyri brúkaran og tey vinnurekandi**

Brúkaraumboðið og FT Samskifti er komið ásamt um, at lýsingarherferðin um tænastuna SamanHald kundi verið neyvari, tá ið talan er um prísupplýsing og treytir, sambært galdandi marknaðarføringslóg. Sjálvt um FT Samskifti í stóran mun hevur fylgt galdandi reglum, kundi nakrar treytir viðvíkjandi tænastuni verði lýstar neyvari.

FT Samskifti vil framyvir leggja størri áherðslu á, grein 3 og 9 í marknaðarføringslógini, so at prísir og treytir ganga greitt og týðiliga fram á øllum lýsingum, so til dømis minstiprísur fyri eina tænastu framgongur.

Eftir ætlan steðgar lýsingarherferðin um SamanHald í komandi viku, og tí verða lýsingarnar ikki broyttar í hesum umfarið. Tá FT Samskifti kemur við nýggjum lýsingarherðferðum, verða broytingar, sum FT Samskifti og Brúkaraumboðið er komið ásamt um, framdar.

Marknaðarføringslógin er nýggj og bæði fyritøkur og lýsingarstovur skulu finna sítt stev í mun til lógina. Fyri at stuðla undir hesum og fremja góðan marknaðarføringssið fer brúkaraumboðið at gera leiðreglur og vegleiðingar. Eitt uppskot til leiðreglur á tele økinum verður í næstum sent til telefeløgini á føroyska marknaðinum til hoyringar. Viðkomandi vinnu- og brúkarafeløg fáa eisini hesar leiðreglur og vegleiðing til hoyringar. Henda vegleiðing er at finna hjá danska brúkaraumboðsmanninum, og verður henda nýtt sum fyrimynd hjá føroyska brúkaraumboðnum.

Ongar leiðreglur ella vegleiðingar fyri góðan marknaðarføringssið finnast í dag á tele økinum í Føroyum, tí fegnast FT Samskifti um at hesar verða til taks í framtíðini, so at øll nútíðar brúkaraatlit verða tikin við, tá ið marknaðarføring verður framd.

Í sambandi við hoyringina av málinum, so hevur FT Samskifti sýnt gott samstarv og skjóta og greiða avgreiðslu, sigur Brúkaraumboðið í skrivi.




**SUZUKI GR. VITARA 2.0 TD VØRUV.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SV 930 **Km:** 64.000
**Árgangur:** sep. 2003
**Útgjald:** 33.750 **Mðr. gjald:** 3.296 (3 ár)
**kr. 135.000,-**



**VW CADDY 1.9 TDI VØRUVOGN.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 915 **Km:** 108.000
**Árgangur:** 01.12.2004
**Útgjald:** 22.500 **Mðr. gjald:** 1.436 (5 ár)
**kr. 90.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 52.000 **Mðr. gjald:** 3.310 (5 ár)
**kr. 208.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 M/M LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UG 268 **Km:** 35.000
**Árgangur:** juli 2007
**Útgjald:** 47.000 **Mðr. gjald:** 2.931 (5 ár)
**kr. 188.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 D-4D H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NS 677 **Km:** 105.000
**Árgangur:** mars 2006
**Útgjald:** 35.000 **Mðr. gjald:** 2.198 (5 ár)
**kr. 140.000,-**



**PEUGEOT 1007** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UH 547 **Km:** 29.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 1.750 (5 ár)
**kr. 108.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 STC. SOL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LM 312 **Km:** 71.000
**Árgangur:** mars 2004
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.755 (3 ár)
**kr. 155.000,-**



**HONDA CIVIC 1.6 SEDAN**

**Skrásetingarnr:** MB 923 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 09.08.2003
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.109 (3 ár)
**kr. 85.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 63.000
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.064 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D TERRA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.840 (3 ár)
**kr. 158.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo